# 10 ráð til sjúklingar

## Ver virkin í viðgerðini við trygd og dygd í huga!

Í sambandi við viðgerð í sjúkrahúsverkinum er umráðandi at sjúklingar eru virknir í egnari sjúklingatrygd og –dygd. Her eru 10 ráð,[1] sum eru verd at geva gætur í sambandi við viðgerð í sjúkrahúsverkinum.

1. **Tryggja tín samleika**
- upplýs fult navn og p-tal
- ver vísur í, at viðgerðin er ætlað tær
- tryggja tær, at tín samleiki verður staðfestur, tá royndir verða tiknar, kanningar gjørdar og heilivágur givin
- kanna um møguligt sjúklingaarmband hevur rætt navn og p-tal
- um tú skalt skurðviðgerast, bið læknan tekna á teg við sprittpenni (tá tað er viðkomandi)

2. **Greið frá um teg sjálvan**
- um hvørji sløg av heilivági, tú nýtir
- um møguliga alternativa viðgerð og náttúruheilivág hjá tær
- um hvat tú annars gert fyri at betra um heilsuna
- um mat og annað sum tú ikki tolir og um serligan kost
- um tú ert við barn

3. **Spyr, inntil tú skilir**
- spyr tá tú ert stúrin ella hugsar um okkurt ávíst
- spyr tá tú ivast, um tú hevur skilt heilsustarvsfólkið
- skriva niður spurningarnar tú ynskir at seta og svarini tú fært

4. **Kanna tín heilivág**
- er tað tín heilivágur?
- er nøgdin tann rætta?
- hví skalt tú taka hann?
- hvussu leingi skalt tú taka hann?
- á hvønn hátt virkar heilivágurin?
- hvussu ávirkast heilivágurin av mati og drekka?

5. **Avvarðandi kunnu hjálpa tær**
- at vera við til viðtalur um tú ynskir tað
- at skilja boð og minnast staklutir
- at tosa tína søk, tá tú ikki sjálvur orkar
- at skriva niður spurningarnar tú ynskir at seta og svarini tú fært

6. **Kunna teg um, hvat bagir tær**
- kunna teg um diagnosuna/sjúkuna
- spyr nærri um kanningar og viðgerðir

7**. Sig frá, um tú hevur pínu ella ikki følir teg væl**
- sig frá umaftur, um tað er neyðugt
- sig frá, hóast tað ikki tykist vera knýtt at sjúkuni

8. **Minka um smittuvandan við at vaska og spritta hendur**
- fyri máltíðir
- eftir at tú hevur verið á vesi og bið um vátserviettar at turka tær um hendurnar við, um tú ert seingjarlagstur

9. **Spyr um framhaldandi viðgerð**
- hvar verður framhaldandi viðgerðin givin og av hvørjum?
- kann  pína ella tregi (óbehag) væntast av viðgerðini?
- skalt tú broyta kostvanar?
- skalt tú binda frið ella halda teg frá ávísum virksemi?

10. **Um tú fært tørv á bráðfeingis heilsuhjálp**
- kanna hvønn tú skalt seta teg í samband við og hvussu tú gert tað
- kanna hvørjar upplýsingar tey fara at spyrja um

[1] Ráðini eru gjørd við fyrimynd og íblástri frá líknandi átøkum í Noregi, Íslandi og hjá WHO

Landssjúkrahúsið